Fíggjarmálaráðið

Løgtingið

Dagfesting: 30/11/2020
Mál nr.: 20/00458
Málsviðgjørt: MM
Eftirkannað: 11. november 2020

Uppskot til løgtingslóg um fíggjarligan stuðul til nýggjan Fjøruveg í Runavík

Uppskot til

Løgtingslóg
um
fíggjarligan stuðul til nýggjan Fjøruveg í Runavík

§ 1. Landsstýrismanninum verður heimilað at veita fíggjarligan stuðul til nýggjan Fjøruveg í Runavík. Vegurin verður gjørdur frá rundkoyringini á Rókini, fram við fjøruni og havnarlagnum í Runavík, til Bakkavegin/Glyvravegin á Glyvrum.
Stk. 2. Fíggjarligi stuðulin til verkætlanina kann í mesta lagi vera 55 mió. kr. Stuðulin verður veittur yvir 5 ár
Stk. 3. Stuðulin fyri 2021 – 2024 verður veittur árliga treytað av, at arbeiðið við Fjøruvegnum verður framt í sama mun, sum stuðul verður goldin út.
Stk. 4. Fjøruvegurin skal lúka galdandi krøv til ferðslutrygd og vera atkomuligur fyri ferðslu til og frá Eysturoyartunlinum, uttan so at vegarbeiði og tílíkt verður gjørt.
Stk. 5. Fjøruvegurin skal vera fríur fyri forðingar sum ferðslubungur og tílíkt, soleiðis at hámarksferðin kann haldast, og ferðslan tarnast minst møguligt.
Stk. 6. Nýggjar íbindingar í Fjøruvegin kunnu bert gerast til ferðsluvegir, ikki til atkomu til bygningar og tílíkt. Er neyðugt at gera nýggja íbinding til annað enn ein ferðsluveg, skulu hesar fyriskipast soleiðis, at hámarksferðin kann haldast, og ferðslan tarnast minst møguligt.
Stk. 7. Útgoldin stuðul kann verða kravdur afturgoldin, um treytirnar í stk. 3 - 6 ikki verða hildnar.

§ 2. Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd, og fer úr gildi 31. desember 2027.

Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

Eysturoyartunnilin verður tikin í nýtslu fyrst í 2021, og merkir tað økta ferðslu eystaru megin við Skálafjørðin. Fyri at betra um ferðsluviðurskiftini til og frá tunlinum ígjøgnum Runavík, Saltangará og Glyvrar, verður nýggjur Fjøruvegur gjørdur at leiða serliga ta tungu ferðsluna til og frá Eysturoyartunlinum burtur frá høvuðsgøtuni í Runavík. Fjøruvegurin, sum er á leið 2,5 km, verður eftir ætlan gjørdur frá rundkoyringini á Rókini, fram við fjøruni og havnarlagnum í Runavík til bakkavegin á Glyvrum. Nýggjur betongtunnil verður eisini gjørdur framvið Rókavegi og undir Løkin og Heiðaveg, og kemur upp við Gulasteinsveg.

Landsstýrismaðurin í fíggjarmálum og borgarstjórin í Runavíkar kommunu umrøddu á fundi 23. september 2020, at býta kostnaðin av nýggja Fjøruvegnum soleiðis, at landið veitir ein stuðul á 55 mió. kr. til verkætlanina. Verkætlanin er kommunal, soleiðis at Runavíkar kommuna fremur verkætlanina og hevur eftirfylgjandi ábyrgd av henni.

Avtala millum Fíggjarmálaráðið og Runavíkar kommunu um Fjøruvegin er hjáløgd. Avtalan er treytað av, at Løgtingið samtykkir hetta uppskot til løgtingslóg um fíggjarligan stuðul til nýggjan Fjøruveg í Runavík, og at Runavíkar býráð samtykkir og fremur verkætlanina sambært ásetingum í hesi løgtingslóg og í avtaluni.

Avtalan fevnir um eina samlaða og samanhangandi vegaloysn frá rundkoyringini á Rókini (A) inn á Glyvraveg á Glyvrum (D), sum víst á hjálagda korti. Alt vegastrekkið verður kommunalur vegur. Tó verða íbindingarnar í Rókaveg og Glyvraveg landsvegur. Verkætlanin verður væntandi liðug í 2024.

Lýsing av verkætlanini/vegaføringini:

A: Vegur frá rundkoyringini á Rókini fer at liggja aftan fyri vinnubygningarnar á Rókahavnini. Vegurin verður lagdur í verandi lendi. Íbindingar verða gjørdar í vegin frá Rókahavnini og Rókavegi.

B: Betongtunnil verður gjørdur framvið Rókavegi og undir Løkin og Heiðaveg, og kemur upp við Gulasteinsveg.

C: Vegur fram við havnarlagnum í Runavík. Vegurin fylgir Gulasteinsvegi/Fjarðavegi fram við fjøruni og uppfyllingini til ætlaða havnarøkið við bryggjuna undir Høgabóli. Vegurin verður bundin í Bakkaveg inni á Glyvrum.

D: Íbindingin í Glyvraveg verður gjørd soleiðis, at Fjøruvegur (Bakkavegur) verður høvuðsvegur í mun til Glyvraveg.

Samlaði kostnaðurin fyri Fjøruvegin verður mettur til 99,2 mió. kr. Runavíkar kommuna ber kostnaðin av verkætlanini við stuðli frá landinum. Stuðulin frá landinum til verkætlanina verður tilsamans 55 mió. kr., sum ásett verður í hesi løgtingslóg um fíggjarligan stuðul til nýggjan Fjøruveg í Runavík. Stuðulin verður veittur yvir 5 ár. Í 2020 er játtanin 13,8 mió. kr. Í 2021 verða 10 mió. kr. játtaðar. Eftir ætlan verða 10 mió. kr. játtaðar í 2022, 12 mió. kr. í 2023 og 9,2 mió. kr. í 2024.

Stuðulin fyri 2021 – 2024 er treytaður av, at arbeiðið við Fjøruvegnum verður framt í sama mun, sum stuðul verður goldin út. Eisini skal Fjøruvegurin lúka galdandi krøv til ferðslutrygd og vera atkomuligur fyri ferðslu til og frá Eysturoyartunlinum, uttan so at vegarbeiði og tílíkt verður gjørt. Alt vegastrekkið skal haldast frítt fyri forðingar sum ferðslubungur og tílíkt, soleiðis at hámarksferðin kann haldast og ferðslan tarnast minst møguligt.

Nýggjar íbindingar í Fjøruvegin kunnu bert gerast til ferðsluvegir, ikki til atkomu til bygningar og tílíkt. Er neyðugt at gera nýggja íbinding til annað enn ein ferðsluveg, skulu hesar fyriskipast soleiðis, at hámarksferðin kann haldast og ferðslan tarnast minst møguligt. Útgoldin stuðul kann verða kravdur afturgoldin, um treytirnar ikki verða hildnar. Útgoldin stuðul kann tó ikki verða kravdur afturgoldin, tá henda løgtingslóg um fíggjarligan stuðul til nýggjan Fjøruveg í Runavík er farin úr gildi.

Avtalan millum Fíggjarmálaráðið og Runavíkar kommunu um Fjøruvegin er galdandi inntil 31. desember 2045. Hetta fyri at tryggja, at treytirnar í § 1, stk. 4 - 6 framhaldandi eru galdandi, eftir at løgtingslóg um fíggjarligan stuðul til nýggjan Fjøruveg í Runavík er farin úr gildi. Fíggjarmálaráðið kann tinglýsa avtaluna á matrikkulin, tá Fjøruvegurin er liðugt bygdur.

1.1. Orsakir til uppskotið

Orsøkin til, at lógaruppskotið verður gjørt, er at fáa til vegar heimild til at veita fíggjarligan stuðul til at gera nýggja farleið í Runavík í sambandi við, at Eysturoyartunnilin verður tikin í nýtslu fyrst í 2021.

1.2. Galdandi lóggáva

Eingin stuðulslóg ella verklagslóg er galdandi.

1.3. Endamálið við uppskotinum

Endamálið við stuðulslógini er at geva landsstýrismanninum heimild til at veita fíggjarligan stuðul til at gera nýggja farleið í Runavík í sambandi við, at Eysturoyartunnilin verður tikin í nýtslu fyrst í 2021.

1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum

Nýggi Fjøruvegurin verður gjørdur fyri at betra um ferðsluviðurskiftini til og frá Eysturoyartunlinum ígjøgnum Runavík, Saltangará og Glyvrar, og fyri at leiða serliga ta tungu ferðsluna til og frá tunlinum burtur frá høvuðsgøtuni í Runavík.

1.5. Ummæli og ummælisskjal

Lógaruppskotið byggir á:

- Avtalu millum Fíggjarmálaráðið og Runavíkar kommunu um fíggjarligan stuðul til nýggjan Fjøruveg.
- Prosjektuppskot, ið Runavíkar kommuna saman við Landsbyggifelagnum hevur latið gjørt.
- Samráðing millum Fíggjarmálaráðið og Runavíkar kommunu á fundi 23. september 2020.

Fíggjarmálaráðið hevur umrøtt avtaluna millum Fíggjarmálaráðið og Runavíkar kommunu um Fjøruvegin við Landsverk, sum ikki hevði viðmerkingar til avtaluna.

Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur

Samlaði kostnaðurin fyri Fjøruvegin verður mettur til 99,2 mió. kr. Runavíkar kommuna ber kostnaðin av verkætlanini við stuðli frá landinum. Stuðulin frá landinum til verkætlanina verður tilsamans 55 mió. kr., sum ásett verður í hesi løgtingslóg um fíggjarligan stuðul til nýggjan Fjøruveg í Runavík. Stuðulin verður veittur yvir 5 ár. Í 2020 er játtanin 13,8 mió. kr. Í 2021 verða 10 mió. kr. játtaðar. Eftir ætlan verða 10 mió. kr. játtaðar í 2022, 12 mió. kr. í 2023 og 9,2 mió. kr. í 2024.

Stuðulin fyri 2021 – 2024 er treytaður av, at arbeiðið við Fjøruvegnum verður framt í sama mun, sum stuðul verður goldin út. Eisini skal Fjøruvegurin lúka galdandi krøv til ferðslutrygd og vera atkomuligur fyri ferðslu til og frá Eysturoyartunlinum, uttan so at vegarbeiði og tílíkt verður gjørt. Alt vegastrekkið skal haldast frítt fyri forðingar sum ferðslubungur og tílíkt, soleiðis at hámarksferðin kann haldast og ferðslan tarnast minst møguligt.

Nýggjar íbindingar í Fjøruvegin kunnu bert gerast til ferðsluvegir, ikki til atkomu til bygningar og tílíkt. Er neyðugt at gera nýggja íbinding til annað enn ein ferðsluveg, skulu hesar fyriskipast soleiðis, at hámarksferðin kann haldast og ferðslan tarnast minst møguligt. Útgoldin stuðul kann verða kravdur afturgoldin, um treytirnar ikki verða hildnar. Útgoldin stuðul kann tó ikki verða kravdur afturgoldin tá henda løgtingslóg um fíggjarligan stuðul til nýggjan Fjøruveg í Runavík er farin úr gildi.

Somuleiðis hevur uppskotið fíggjarligar avleiðingar fyri Runavíkar kommunu í sambandi við rakstur og viðlíkahald av vegnum.

Runavíkar kommuna gjørdi tann 16. september 2020 avtalu við Landsbyggifelagið um ráðgeving í sambandi við gerð av Fjøruvegnum. Avtalan fevnir millum annað um lýsing av byggiætlan, neyðugar forkanningar, íbindingar, tunnil og skipan av havnarøkinum á Rókini.

2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur

Alt vegastrekkið verður kommunalur vegur. Runavíkar kommunu fær umsitingarligar avleiðingar í sambandi við at fyrireika verkætlanina, at bjóða arbeiðið út og hava eftirlit við verkætlanini. Somuleiðis hevur uppskotið umsitingarligar avleiðingar fyri Runavíkar kommunu í sambandi við rakstur og viðlíkahald av vegnum.

2.3. Avleiðingar fyri vinnuna

Betri ferðsluviðurskiftir til og frá tunlinum hevur jaliga ávirkan á umstøðurnar hjá vinnuni at virka í.

2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið

Vegagerð broytir náttúruna, har vegur verður gjørdur. Dentur verður lagdur á at vegurin fellur væl inn í landslagið, og at hampað verður fram við vegnum. Runavíkar kommuna hevur eisini lagt stóran dent á at órógva nátturuna minst møguligt, millum annað soleiðis at tann tunga ferðslan verður leidd aftanfyri bygningarnir á havnarlagnum og gjøgnum ein betongtunnil, sum kemur upp við Gulasteinsveg. Tunnilin verður lagdur niður í lendið og tyrvdur. Løkin verður endurskapt og kemur at renna tvørturum tunnilin. Uppskotið er eisini tillagað miðbýarætlanina hjá Runavíkar kommunu, har dentur verður lagdur á friðhalgan av býnum.

2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum
Lógaruppskotið hevur serliga positiva ávirkan á ferðsluviðurskiftini í Runavík og bygdunum har á leiðini.

2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir
Lógaruppskotið hevur ikki avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir.

2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum
Uppskotið hevur ikki týdning fyri millumtjóða sáttmálar á økinum.

2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar
Uppskotið hevur ikki týdning fyri tvørgangandi millumtjóða sáttmálar.

2.9. Markaforðingar
Uppskotið elvir ikki til markaforðingar.

2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv
Útgoldin stuðul kann verða kravdur afturgoldin, um treytirnar í stk. 3 - 6 ikki verða hildnar. Uppskotið elvir annars ikki til revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv.

2.11. Skattir og avgjøld
Uppskotið hevur ikki ásetingar um skattir og avgjøld.

2.12. Gjøld
Uppskotið hevur ikki ásetingar um fyri gjøld.

2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?
Lógaruppskotið áleggur ikki likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur.

2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrismannin, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?
Lógaruppskotið heimilar landsstýrismanninum at veita fíggjarliga stuðul á 55 mió. kr. til at byggja nýggjan Fjøruveg í Runavík.

2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?
Lógaruppskotið gevur ikki almennum myndugleikum atgongd til privata ogn.

2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?
Lógaruppskotið hevur ikki aðrar avleiðingar.

2.17. Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum

	Fyri landið ella landsmyndug-leikar	Fyri kommunalar myndugleikar	Fyri pláss ella øki í landinum	Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir	Fyri vinnuna
Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar	Ja	Ja	Ja	Nei	Ja
Umsitingarligar avleiðingar	Nei	Ja	Nei	Nei	Nei
Umhvørvisligar avleiðingar	Nei	Ja	Ja	Nei	Nei
Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Sosialar avleiðingar			Nei	Nei	

Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

3.1. Viðmerkingar til ta einstøku greinina

Til § 1
Í § 1 verður heimilað landsstýrismanninum at veita fíggjarligan stuðul til at gera nýggjan Fjøruveg í Runavík. § 1 ásetir eisini, at tann fíggjarligi stuðulin til verkætlanina í mesta lagi kann vera 55 mió. kr., sum verður veittur yvir 5 ár.

Í stk. 3 er ásett, at stuðulin fyri 2021 – 2024 er treytaður av, at arbeiðið við Fjøruvegnum verður framt í sama mun, sum stuðul verður goldin út.

Sambært stk. 4 skal Fjøruvegurin lúka galdandi krøv til ferðslutrygd og vera atkomuligur fyri ferðslu til og frá Eysturoyartunlinum, uttan so at vegarbeiði og tílíkt verður gjørt. Eisini skal Fjøruvegurin skal vera fríur fyri forðingar sum ferðslubungur og tílíkt, soleiðis at hámarksferðin kann haldast og ferðslan tarnast minst møguligt, sbrt. stk. 5.

Stk. 6 ásetir, at nýggjar íbindingar í Fjøruvegin bert kunnu gerast til ferðsluvegir, ikki til atkomu til bygningar og tílíkt. Er neyðugt at gera nýggja íbinding til annað enn ein ferðsluveg, skulu hesar fyriskipast soleiðis, at hámarksferðin kann haldast og ferðslan tarnast minst møguligt.

Til § 2
§ 2 ásetir gildiskomu, og nær lógin fer úr gildi. Eftir ætlan verður vegagerðin liðug í 2024. Lógin fer úr gildi 31. desember 2027.

Avtalan millum Fíggjarmálaráðið og Runavíkar kommunu um Fjøruvegin er galdandi inntil 31. desember 2045. Hetta fyri at tryggja, at treytirnar í § 1, stk. 4 - 6 framhaldandi eru galdandi, eftir at løgtingslóg um fíggjarligan stuðul til nýggjan Fjøruveg í Runavík er farin úr gildi. Fíggjarmálaráðið kann tinglýsa avtaluna á matrikkulin, tá Fjøruvegurin er liðugt bygdur.

Fíggjarmálaráðið, 30. november 2020

Jørgen Niclasen
landsstýrismaður

/ Bjarni Askham Bjarnason

Yvirlit yvir fylgiskjøl:
Fylgiskjal 1: Avtala millum Fíggjarmálaráðið og Runavíkar kommunu um nýggjan Fjøruveg í Runavík.